UTTAN ÚR HEIMI

Fekk bræv frá Saddam

Arabiska blaðið Al-Quds Al-Arabi, sum verður útgivið í London, prentaði í gjár eitt hondskrivað bræv, sum ein, ið kallar seg Saddam Hussein, hevði skrivað undir. Brævið er dagsfest tann 28. apríl.

Í brævinum mælir brævskrivarin irakska fólkinum til at seta seg upp ímóti amerikansku hermonnunum, og hann ávarar irakar ímóti at viðurkenna teir leiðararnar, sum amerikanararnir ætla at seta til at stýra Irak.

Týsdagin prentaði tað sama blaðið eina yvirlýsing frá einum higartil ókendum felagsskapi, sum vildi vera við, at Saddam Hussein fer at lata irakska fólkið frætta frá sær ein av teimum fyrstu døgunum.

Aftur av samráðast

Nú er likt til, at friðarsamráðingarnar á Sri Lanka, sum slitnaðu tann 21. apríl, verða tiknar uppaftur í næstu viku.

Teir tamilsku tikararnir tóku seg burtur úr samráðingunum, tí teir vóru ikki nøgdir við gongdina í samráðingunum. Eitt nú vildu tamilarnir vera við, at stjórnin í Colombo hevur ikki hildið lyfti sítt um hjálp til fólkið har norðuri í landinum. Men í gjár frættist, at leiðarin hjá tikarunum, Anton Balasingham, hevur játtað at tosa við umboð fyri stjórnina um at taka samráðingarnar uppaftur.

Norskir diplomatar hava verið millumgongumenn í samráðingunum um frið á Sri Lanka, og tað eru eisini teir, sum hava fingið tamilsku tikararnar at umhugsa at taka samráðingarnar uppaftur.

Fingið tilboð um arbeiði

Fyrrverandi irakski kunningarmálaráðharrin, Mohammed Saeed al-Sahaf, hevur nú fingið tilboð um arbeiði hjá einum arabiskum sjónvarpi.

Ali al-Hadethi, sum er ein av leiðarunum í sjónvarpsstøðini al-Arabiya, sigur, at teir eru til reiðar at bjóða fyrrverandi kunningarmálaráðharranum hjá Saddam Hussein arbeiði sum politiskur viðmerkjari. Sambært sjónvarpinum eru tað tær drúgvu royndirnar, sum serliga hava áhuga, og tí hann verður hildin at hava góðar fortreytir fyri at lýsa gongdina í Irak.

Mohammed Saeed al-Sahaf stendur ikki á listanum við teimum 55 fyrrverandi irakssku politikarunum, hervyirmonnunum og tænastumonnunum, sum amerikanararnir vilja hava fatur á. Men amerikanararnir hava ikki havt gott eyga á honum, síðani hann vísti almenninginum amerikanskar hermenn, sum irakski herurin hevði tikið til fanga. Tað er heldur eingin, sum veit, hvar fyrrverandi kunningarmálaráðharrin er.

11 ára fongsul

Cesare Previti, sum var verjumálaráðharri í stjórnini hjá italska forsætisráðharranum, Silvio Berlusconi, í 1994, hevur fingið ellivu ára fongsul fyri at hava roynt at mutra dómarar.

Ein dómstólur í Milano dømdi mánadagin Cesare Previti sekan í at hava roynt at ávirka dómararnar, sum skuldu taka støðu til nøkur sakarmál í nítiárunum. Málini snúðu seg um fíggjarligu áhugamálini hjá Berlusconi í italska fjølmiðlaheiminum.

Italsku fjølmiðlarnir hava gjørt nógv burtur úr rættarmálinum ímóti Previti, ið verður mettur millum teirra, sum hava sera gott samband við forsætisráðharran. Cesare Previti er eisini tjóðartingslimur í flokkinum Forza Italia, sum Berlusconi er formaður í.

Grønland vil hava Norðpólin

Grønlendingar og danir ætla sær nú at prógva, at Norðpólurin er á sama meginlandsstøði sum Grønland.

GRØNLAND
Árni Joensen

Danir fáa úr at gera á jarðfrøðiøkinum tey næstu árini. Saman við føroyingum skulu teir royna at sannføra onnur um, at føroyska meginlandsstøðið røkkur langt suðureftir, og samstundis skulu teir saman við grønlendingum sannføra uppaftur onnur um, at tað grønlendska meginlandsstøðið røkkur væl norður um norðasta blettin í Grønlandi.

Fyrradagin staðfesti Fólkatingið altjóða havrættarsáttmálan, og harvið er tann fyrsti hornasteinurin lagdur undir arbeiðið.

Danir og grønlendingar hava sett sær fyri at prógva, at økið við Norðpólin hevur samband við Grønland jarðfrøðiliga, og at Norðpólurin er á sama meginlandsstøði sum Grønland. Men teir eru ikki teir einastu, sum halda seg eiga Norðpólin. Fyri tveimum árum síðani kunngjørdu russar, at teir meta økið við Norðpólin sum part av russiska meginlandsstøðinum.

Norðpólurin er 380 fjórðingar norðan fyri Grønland.

Tey seinastu árini er pólurin vorðin eitt ferðamál. Tað eru serliga stórir russiskir ísbrótarar, sum sigla norður til póløkið við ferðafólki.

Aftur ein sjálvmorðsbumba

Bumban, sum brast í Mike's Place í Tel Aviv var fylt við seymi. Fýra doyðu, og næstan 50 vórðu særd

Hesaferð sprongdi ein palestini eina sjálvmorðsbumbu í Tel Aviv. Fýra fólk doyðu.

ÍSRAEL
Árni Joensen

Ikki minni enn tveir palestinskir felagsskapir boðaðu frá, at tað vóru teir, sum skipaðu fyri, tá ein sjálvmorðsbumba drap fýra fólk á einari matstovu í Tel Aviv gjáranáttina. Á matstovuni Mike's Place sótu nógv ungfólk og lurtaðu eftir jazzrónleiki, tá bumban brast. Sambært ísraelsku løgregluni var bumban fylt við seymi.

Atsóknin var bert fáar tímar eftir, at teir palestinsku sjálvsstýrismyndugleikarnir høvdu góðkent ta nýggju stjórnina hjá Mahmoud Abbas, forsætisráðharra, men hon vísir eisini, hvussu trupul uppgávan hjá stjórnini er.

Amerikanska stjórnin fordømdi alt fyri eitt atsóknina, men ein talsmaður hjá George W. Bush, forseta legði afturat, at tilburðurin fer ikki at forða friðartilgongdini.

ES kostar Danmark milliardir

Í mong ár hevur Danmark havt fíggjarligan fyrimun av limaskapinum í ES, men soleiðis er ikki longur.

DANMARK
Árni Joensen

Útrokningar hjá fíggjarmálaráðnum í Keypmannahavn vísa, at um fá ár fer limaskapurin í ES at kosta dønum einar tvær milliardir krónur um árið.

Seinastu 30 árini hevur Danmark havt fíggjarligan fyrimun av ES-limaskapinum, men fyri einum ári síðani vísti hesin roknskapurin fyrstu ferð hall. Sambært fíggjarmálaráðnum var hallið 200 milliónir krónur í 2001, og nú vísa útrokningar, at um trý ár verður hetta talið tíggju ferðir størri.

Tað eru serliga tvinnar orsøkir til gongdina. Næsta ár fer tað at kosta dønum 256 milliónir krónur, at ES fær nýggj limalond, og í 2006 verður hendan útreiðslan oman fyri 800 milliónir krónur. Samstundis hevur ES samtykt ein nýggjan hátt at áseta prísin fyri limaskap, og í 2006 skulu danir rinda eina góða milliard krónur. Soleiðis er hetta eisini.

Men hetta eiga danir at góðtaka. Tað heldur í hvussu er formaðurin í Evropanevndini hjá Fólkatinginum, sosialdemokraturin Claus Larsen-Jensen. Hann vísir á, at Danmark er tað nærstríkasta landið í ES, og tað er tí ikki annað enn rímiligt, at landið rindar tað, sum tað kostar at vera uppií, sigur hann.

NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Sannelena á Lofti 95 ár

Í dag, 1. mai, fyllir Súsanna Malena Poulsen, vanliga nevnd Sannelena á Lofti, á Eiði, 95 ár. Sannelena er fødd og uppvaksin í Tjørnuvík. Sum ung kom hon til Havnar, har hon tænti hjá Jens Paula í Dali, sjómansskúlastjóra, sum búði uppi við Pisuvarða. Eins og so mangar norðanfjørðsgentur so fór Sannelena til Vágs at arbeiða í fiski, hon arbeiddi á Gørðunum hjá Magnus Dahl.

Sannelena giftist í 1930 við Jóan Petur Poulsen, vanliga nevndur Pedda á Lofti, av Eiði. Tey fingu børnini: Herdis, Selmu, Kobu, Sigmund, Svenning, Olaf (1947-1955) og Jónsvein. Familjan búði á Eiði til 1955, tá tey fluttu til Havnar. Til jólar í 1958 fluttu tey inn í nýggj hús í Perskonugøtu í Havn. Í Havn arbeiddu Sannelena og Pedda á Bacalao.

Pedda byrjaði sum 12 ára gamal at røgva út á norðhavinum við pápa sínum og var fiski- og arbeiðsmaður alt sítt lív.

Í 1972 fluttu Sannelena og Pedda aftur til Eiðis at búgva. Tey arbeiddu bæði á nýstovnaða flakavirkinum, Norðís. Pedda doyði í 1986, 84 ára gamal. Sannelena býr í dag einsamøll, hon er púra klár og heldur hús sjálv. Hon kemur eisini til møtir í salinum, Mizpa, á Eiði, tá onkur er at koyra hana. Føðingardagurin verður hildin saman við børnunum.

Anfinn Kallsberg, løgmaður, fær her handaðar 300 undirskriftir frá Soffi Egholm vegna áhugabólkin í Kvívíkar sókn

Áhugabólkur í Kvívíkar sókn savnaði 300 undirskriftir

Mikudagin vóru 300 undirskriftir handaðar Anfinni Kallsberg løgmanni, í sambandi við at posthúsini í Leynum og Kvívík eru afturlatin. Tað var Soffi Egholm í Leynum, sum vegna ein áhugabólk í Kvívíkar sókn, handaði løgmanni undiskriftirnar

POSTVERKIÐ
Magnus Gunnarsson

Tá posthúsini í Leynum og Kvívík herfyri lótu aftur, var ein fundur í Glæmuni í Kvívík, har eini 100 fólk úr sóknini møttu. Á fundinum var eisini postverksstjórin og ein deildarleiðari. Síðan tá hevur ein av stigtakarunum til fundin, Soffi Egholm í Leynum, vegna ein áhugabólk í Kvívíkar sókn, savnað 300 undirskrifir, sum vóru handaðar løgmanni. Heini Holm, borgarstjóri í Kvívíkar sókn, var eisini við tá undirskriftirnar vórðu handaðar. Í mótmælisskrivinum, sum løgmanni fekk, stendur m.a. at tey eru misnøgd við, at posthúsini eru stongd, og tey seta sum krav, at tey fáa eina landpostrutu ístaðin. Eisini eru tey misnøgd við, at posthúsini vórðu stongd, uttan at borgararnir í sóknini vórðu eftirspurdir. Tey vóna at løgmaður, sum hægsti myndugleiki, fær laga tað so at borgararnir í sóknini fáa rímiligar sømdir, og funnar verða tíðarhóskandi loysnir á trupulleikanum. Bjarni Djurholm er landsstýrismaður í postmálum. Í Kvívíkar sókn eru bygdirnar: Leynar, Stykkið, Skælingur, Kvívík og Válur.

Ellisakfør á Shellstøðini flaggdagin

Nógv fólk komu inn á Shellstøðina flaggdagin. Her standa nakrir og práta um gamlar bilar, f.v. Júst Sivertsen, Geir Wardum, leiðari á Shellstøðini, Atli Simonsen og Niels Pauli Hjaltalin
mynd: Eirikur Lindenskov

Flaggdagin, fríggjadagin 25. apríl, var árliga flaggdagskoyringin hjá áhugafelagnum Føroya Ellisakfør. Í sambandi við tiltakið vóru ellisakførini sýnd fram á Shellstøðini við Ringvegin, har tey bjóðaðu ymiskt til bæði børn og vaksin

FLAGGDAGSKOYRING
Magnus Gunnarsson

Flaggdagskoyringin hjá áhugafelagnum Føroya Ellisakfør hevur verið eitt aftur vendandi tiltak, síðan felagið varð stovnað í 1992. Í ár byrjaði koyringin við at ellisakførini møttust á Shellstøðini við Ringvegin kl. 14.00. Síðan varð koyrt oman á Kongabrúnna, har ellisakførini stóðu, meðan flaggdagshaldið á Vaglinum fór fram. Eftir flaggdagshaldið varð koyrt niðan aftur á Shellstøðina við Ringvegin, har ellisakførini vóru sýnd fram. Samstundis sum gomlu bilarnir og gomlu motorsúkklurnar stóðu á økinum hjá Shellstøðini, fingu øll tey vitjandi okkurt gott, tey vaksnu fingu kaffi og wienarbreyð og børnini fingu ís og sunkist. Áhugin var stórur, og nógv fólk vitjaðu á Shellstøðini.

Ein av snøggu gomlu bilunum, Mercedes Benz 190 frá 1961, hjá Niels Paula Hjaltalin. Maðurin á myndini er John Christiansen koyrilærari
mynd: Eirikur Lindenskov

Ein heilsan til pápa!

Góði pápi, vit vilja her bera tær eina hjartans tøkk, fyri alt tað tú gavst okkum og alt sum vit lærdu av tær.

Góði pápi! Tú varst altíð klárur at hjálpa okkum bæði í sorg og gleði, tú hugsaði eisini altíð um familjur okkara, um nú øll høvdu tað gott, góði pápi, tú stóð altíð sterkur við okkara lið.

Tað er ikki so lætt at skriva hesar reglur, nú í vit skulu til at siga tær farvæl her á fold, bert 3 ár eftir at vit mistu mammu. Vit sakna tykkum nógv, men góði pápi, nú ert tú komin heim til tíni, sum tú saknaði so nógv, pápi, tú hevur verið okkum ein góður pápi, verfaðir, abbi og langabbi, sum vit øll elskaðu so høgt. Takk fyri alt, vit møtast vónandi øll aftur heima í himlinum. Hvíl í friði.

Heilsan Johannus 11 Vers 21-22

Marta sagde da til Jesus: Herre! Havde du været her, var min broder ikke død.

Men selv nu ved jeg, at alt, hvad du beder Gud om, vil Gud give dig.

Heilsan frá okkum systkjunum.

Margith

Dagurin

Mai. Nevndur eftir rómversku gudinnuni Maju, sum var gudinna fyri gróðri og grøði. Summir halda, at navnið kemur av latínska orðinum *majores, teir gomlu,* ið var navnið á gamla senatinum í Róm.

1. mai. Valborgarmessa. Hildin til minnis um enska kongsdóttur og nunnu, sum seinni gjørdist abbadissa í kleystrinum Hildesheim í Týsklandi. Hon doyði í 779. Valborgarnátt varð hildin mikil várveitsla, eisini í Norðurlondum, og tað er ta náttina, at trøllkonur ríða at Bloksbjørgum. Germanskt navn, ið merkir *vald* og *vernd*.

Í gomlum almanakkum stóðu eisini nøvnini á tveimum lærusveinum hjá Jesusi, *Filippusi* og *Jákupi*. Søgan sigur, at Filippus varð steinaður til deyða í Hierapolis, og at Jákup, sonur Alfeusar, eisini róptur Yngri Jákup ella Lítli Jákup, varð fyribeindur av jødunum.

1. mai er *arbeiðaradagurin*, sum varð hildin á fyrsta sinni í Paris í 1889.